POSTGJØLD

Frá 1. november 1977 verða gjøldini fyri postpakkar millum Føroyar og Danmark og gjøldini fyri brævpost úr Føroyum til útheimin út um Norðurlond broytt.

Nýggju postgjøldini eru hesi:

Pakkar millum Føroyar og Danmark

	— 1 kg	8,00 kr.
1	1 kg— 5 kg	13,00 kr.
5	kg 5 kg—10 kg	20,00 kr.
10	kg 10 kg—15 kg	28,00 kr.
	15 kg—20 kg	40,00 kr.

Brævpostur til útheimin út um Norðurlond

Postkort		1,30 kr.
Brøv	— 20 g	1,80 kr.
	20 g -100 g	4,00 kr.
	100 g -250 g	8,00 kr.
	250 g -500 g	15,00 kr.
	500 g — 1 kg	26,00 kr.
	1 kg— 2 kg	42,00 kr.
Prentlutir	— 20 g	0,90 kr.
	20 g —100 g	2,00 kr.
	100 g —250 g	3,50 kr.
	250 g —500 g	6,00 kr.
	500 g — 1 kg	9,00 kr.
	1 kg— 2 kg	14,00 kr.
	2 kg— 3 kg	20,00 kr.
	3 kg— 4 kg	25,00 kr.
	4 kg— 5 kg	31,00 kr.
Smápakkar	—100 g	2,00 kr.
	100 g—250 g	3,50 kr.
	250 g—500 g	6,00 kr.
	500 g— 1 kg	10,00 kr.

POSTVERK FØROYA

Sjúkrahússtjóri

Starvið sum sjúkrahússtjóri verður aftur lýst leyst til setan. Stjórin hevur umsitingina av teimum trimum sjúkrahúsunum um hendi og er samstundis skrivari hjá sjúkrahússtýrinum. Starvið er lønt í 37. lønarrammu í tænastumannalógini við eftirlønarskipan. Lønin er í løtuni kr. 190.658,— árliga. Umsóknir mugu vera landsstýrinum í hendi í seinasta lagi 1. desember 1977.

FØROYA LANDSSTÝRI

LÝSING

Søkt verður eftir fyristøðukvinnu til Ellisheimið í Tórshavn at byrja 1. desember 1977 ella so skjótt til ber.

Starvið er í dag normerað í 13. lønarflokki sambært starvsmannafelagssáttmálan. Byrjunar lønin er kr. 6.343.25 og endalønin er kr. 7.694,33.


Arbeiðið sum fyristøðukvinna umfatar alla arbeiðsgongdina á heiminum umframt alt tað administrativa arbeiðið.

Á heiminum eru nú 26 fastbúgvandi fólk.

Allar upplýsingar um arbeiðið fáast við at venda sær til frú Mallu Samuelsen tlf. 11839 Ellisheimið.

Umsóknir við avriti av útbúgving verða at senda til Tórshavnar býráð, og stíla til sosialu nevnd, V. U. Hammershaimbsgøta 3, í seinasta lagi 20. november 1977.

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ



KUNNGERÐ

galdandi frá mánamorgni 31.10. 1977, kl. 7.00, um skipan av akferðslu í Tórshavn, meðan 3. byggistig av gjøgnumføring av J. Paturssonar gøtu verður framt.

1. **Niels Finsens gøta** verður avbrotin við **Bøkjarabrekku-Steinagøtu.**

2. **Bøkjarabrekka** verður stongd fyri allari ferðslu millum **N. Finsens gøtu** og **Tinghúsvegin.**

3. **Tórsgøta** niðan til **Sverrisgøtu** verður blindgøta við innkoyring úr Vágsbotni.

4. **»EINGIN GJØGNUMKOYRING«** verður á strekkinum **Niels Winthersgøtu-Tórsgøtu til Sverrisgøtu.**

5. Eingin innkoyring verður til ovara part av **Dalavegi** frá **Heygsbreyt.**

6. **Tinghúsvegur** verður einsrættaður niðaneftir frá **Gripsvegi** til **Undir Pisuvarða.**

Umframt verður **»EINGIN STEÐGUR«** í parti av **R. C. Effersøesgøtu,** ovara parti av **Bøkjarabrekku** og á **Tinghúsvegi** millum **Bøkjarabrekku** og **Sverrisgøtu.**

BÝARVERKFRØÐINGURIN